## Bilbumba drap sjey

Sjey fólk doyðu, og 17 vórðu særd, tá ein sjálvmorðsbumbumaður sprongdi seg í luftina inni á einari løgreglustøð í býnum Mosul har norðuri í Irak í morgun. Fýra av teimum deyðu vóru løgreglumenn. Mosul er einar 390 kilometrar norðan fyri Bagdad, og amerikanska herleiðslan í Irak hevur sagt, at økið har norðuri í landinum er tað seinasta veruliga stríðsøki í Irak. Iraksku myndugleikarnir siga, at al-Qaeda og ymsir vápnaðir bólkar gera framvegis um seg í Norðurirak, meðan tað er vorðið meiri friðarligt aðrastaðni í landinum.



## Arabar styðja al-Bashir

Tey arabisku londini góðtaka ikki avgerðina hjá Altjóða Revsirættinum at geva boð um, mnat sudanski forsetin, Omar al-Bashir, skal handtakast orsakað av tí, sum er hent í Darfur. Í einari yvirlýsing frá einum leiðarafundi hjá teimum arabisku londunum siga ríkisleiðararnir, at tann arabiski heimurin styðjar Sudan. Leiðararnir siga eisini, at teir styðjka landsins forseta, Omar al-Bashir, og teir viðurkenna ikki avgerðina hjá ICC um at handtaka hann. Yvirlýsingin nevnir ikki Darfur.

# Magni Laksáfoss hevur skatt okkum

**Á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum leygardagin vóru fundarfólk ikki blíð við Magna Laksáfoss eftir at hann alment húðflongdi Jóannes Eidesgaard fyri ikki at gera nakað til nyttu sum landsstýrismaður í fíggjarmálum**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hesir báðir eru gamlir í garði, frá vinstru Ivan Johannesen, fyrrverandi tingmaður og landsstýrismaður og Jákup Joensen, fyrrverandi løgtingsmaður vóru eisini á landsfundi hjá Sambandsflokkinum leygardagin. Men tað vóru nú ikki teir báðir, sum løgdu seg út í kjakið um framferðina hjá Magná Laksáfoss*

Kaj Leo Johannesen, løgmaður og formaður Sambandsfloksins, góðtekurikkiófølkaliga framferð ímillum limir í landsstýrissamgonguni.

Tað var orsøkin til at hann alment átalaði sín egna floksfelaga, Magna Laksáfoss, fyrr í vikuni.

- Mann eigur at kunna tala at, vissi mann er óhøvviskur ímóti einum samstarvsfelaga, segði Kaj Leo Johannesen á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum á Viðareiði Leygardagin.

Tað, sum hann í hesum føri metir sum ófólkaliga framferð, var eitt lesarabræv frá Magná Laksáfoss nú um dagarnar, har hann alment húðflongdi Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum, fyri onki at gera til nyttu og fyri ikki at koma við nøkrum boðum upp á ein føroyskan fíggjarpolitikk.

### Mátti tala at

Kaj Leo Johannesen, sum er løgmaður og floksformaður hjá Magna Laksáfoss, metti, at hetta álopið á Jóannes Eidesgaard var so grovt, at hann boðaði alment frá, at hetta var ikki eitt sjónarmið, sum Sambandsflokkurin stendur fyri.

Tí hevði hann alment átalað Magna Laksáfoss og á landsfundinum leygardagin boðaði hann frá, at hann hevði fingið fulla undirtøku fyri hesum frá næstformanni floksins, Johan Dahl.

- Eg skal aldrin blanda meg upp í, hvørja meining, flokslimir hava, tí øll hava loyvi at hava sínar egnu meiningar. Men mann eigur at kunna tala, vissi mann er óhøviskur ímóti einum samstarvspartnara, segði Kaj Leo Johannesen.

Hann ásannaði, at meiningarnar í flokkinum kunnu vera ymiskar um hetta, men tað verður tikið upp innanfloks.

At viðgerða slík viðurski fti alment førir ikki til anna enn spjaðing og tí er tað alt annað enn gott fyri flokkin, legði hann afturat.

### Skaðar flokkin

Kaj Leo Johannesen var ikki tann einasti, sum átalaði Magna Laksáfoss á landsfundinum.

Minsttríggir fundarluttakarar vóru eisini á røðarapall inum og átalaði Magna Laksáfoss fyri framferðina ímóti landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Ein fundarluttakari vísti á, at er ónøgd við samstarvið í samgonguni, eigur tað at verða tikið upp og avgreitt innanhýsis, áðrenn tað verður borðreitt fyri almenninginum.

- Tað er ikki gott við útsøgnum av hesum slagi, segði ein fundarluttakari og sipaði til lesarabrævið frá Magna Laksáfoss.

Ein annar fundarluttakari metti, at tað var skeivt at koma við útsøgnum av hesum slagi um samgongufelagar, tí tað skaðar flokkin.

# Havnin er so rík at ongin annar klárar at fylgja við

**Allar kommunur í Føroyum skulu vera áleið á sama støði og tí er neyðugt við eini útjavningarskipan og eini blokkstuðulsskipan til kommunurnar. Samstundis mugu vit hyggja eftir skuldini hjá kommununum, staðfesti Kaj Leo Johannesen á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*



*Tað er neyðugt við eini kommunalari útjavningarskipan, so at ongin dettur niður ímillum, sigur Kaj Leo Johannesen, sum her situr á landsfundi hjá Sambandsflokkinum á Viðareiði ímillum Ivan Johannesen og Jónu Mortensen*

Í framtíðini skulu tað vera sjey kommunur í Føroyum.

Tað staðfesti Kaj Leo Johannesen, løgmaður og formaður Sambandsflokksins, á landsfundinum á Viðareiði um vikuskiftið.

Hann staðfesti, at tá ið arbeiðsbólkurin hjá landsstýrinum, sum er settur at arbeiða við einum nýggjum kommunubygnaði, er liðugur í summar, verður farið undir eina tilgongd, sum miðjar ímóti at alt landið leggur saman í sjey kommunur.

Hann staðfestir eisini, at nýggi kommunubygnaðurin skal setast í verk 1. januar 2011.

### Ikki A og B kommunur

Men Kaj Leo Johannesen er somuleiðis greiður yvir, at samstundis, sum kommunur leggja saman, skal ein skipan gerast við kommunalari útjavning og einum blokkstuðuli til kommunurnar, so at peningur fylgir við so hvørt kommunurnar fáa fleiri málsøki at umsita.

- Tað er neyðugt at vit fáa eina útjavningarskipan og eina blokkstuðulsskipan, so at allar kommunurnar verða áleið á sama støði.

Hann sigur, at tað er avgerðandi neyðugt, at vit ikki fáa A og B kommunur í landinum.

- Høvuðsstaðurin er ein A kommuna ímeðan aðrar kommunur er B kommunur, staðfestir hann.

Hann sigur, at eisini politikarar í høvuðsstaðnum mugu ásanna, at Havnin er so rík at ongin annar klárar at fylgja við.

- Inntøkugrundarlagið hjá Havnini er eitt heilt annað enn hjá øðrum kommunum og tað skerst heldur ikki burtur, at møguleikarnar hjá kommunum kring landið at skapa sær eitt inntøkugrundarlag, er ikki til staðar í sama sum hjá høvuðsstaðarkommununi.

- Tað er í Havn, at allar inntøkurnar eru og tí er neyðugt við eini útjavningarskipan, so at øll øki verða áleið líka sterk og so at ongin dettur niður ímillum.

- Vit hava ábyrgd mótvegis hvørjum øðrum, staðfestir løgmaður og formaður Sambandsfloksins.

### Skuldarbyrðan lækkast

Men Kaj Leo Johannesen leggur eisini dent á, at í sambandi við kommunusamanlegging, verður eisini neyðugt at hyggja eftir kommunuskuldini.

- Tað ber ikki til at sita og hyggja at ímeðan kommunur ikki virkisførar, tí tær eru so illa sperdar fíggjarliga. Tí verður tað neyðugt at fáa alla fíggjarligar byrður niður á eitt støði sum ger, at tær fáa arbeitt.

Men vilja kommunurnar ikki leggja saman, hvat hendir so?

- Eg vil bara siga, at vit hava eitt samgonguskjal at halda okkum til og tá ið arbeiðsbólkurin er liðugur í summar, fara vit í eitt opið og uppbyggjandi samskifti við kommunurnar.

Og hann ivast ikki í, at tað fer at eydnast at leggja saman í góðum samstarvi við kommunurnar, tí sum hann lesur støðuna, eru tað nógvar kommunur, sum bara sita og bíða eftir einum útspælið frá landinum og sum eru sinnaðar at leggja saman.